# Eysturoyggin tekur kappingina upp

**Nýggja ferðaskrivstovan Novena Tours í Saltangará lat upp mikudagin. Vantandi gistingar á hotellunum í Eysturoy vóru beinleiðis grundin til stigið, sigur annar stigtakarin**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Erla Weihe Johannesen er sett í starv starv hjá Novena Tours*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Saltangará:**
Ov fáar gistingar á hotellunum í Eysturoy í fjør var beinleiðis grundin til, at nýggj ferðaskrivstova nú er latin upp í Saltangará.

Tað eru teir báðir hotelstjórarnir, Pól Jákup Poulsen á Runavíkar Sjómansheimi, og Frank Kruse Nielsen á Hotel Lonini á Eiði, sum hava tikið stig til og reka nýggju ferðaskrivstovuna, Novena Tours í Saltangará.

At standa fyri dagliga rakstrinum hava teir sett Erlu Weihe Johanesen, sum er útbúgvin í ferðavinnu hjá DSB í Danmark og seinnu tíðina hevur arbeitt hjá Flogfelag Føroya.

Bæði leiðarin á Runavíkar Sjómansheimi og á Hotel Lonini byrjaðu nýggir í vinnuni í fjør, greiðir Pól Jákup Poulsen frá. Og báðir sannaðu, at talið á vitjandi á hotellunum báðum í Eysturoy var í lægra lagi. Teir tosaðu tí saman um, hvat gerast ku ndi fyri at betra um støðuna, og úrslitið gjørdist so Novena Tours, sigur hann.

Ætlanin er greitt í fyrsta umfari at royna at fáa fleiri fremmand ferðafólk hendanveg. Og eitt sindur sjálvsøkin hevur tú væl loyvi at vera og royna at fáa kundar til títt egna øki, heldur Pól Jákup Poulsen. Tað verið seg bæði ferðafólk,sum ferðast einasmøll, bólkar og fyri tann skuld eisini ferðamannaskip, sum kundu hugsast at vitja økið.

Sjálvandi fer Novena Tours eisini at selja føroyingum, sum ætla at feðrast úti í heimi, ferðaseðlar. Bæði vanligar ferðaseðlar millum lond og eisini charterferðir. On-line skipan er, so til ber at leggja ferðir til rættis um allan heim.

Novena Tours hevur avtalur við fleiri hotel í Danmark, soleiðis at til ber at keypa feðaseðlar og gisting alt um eina leið, sigur Pól Jákup Poulsen. Eysturoyggin er vinnuoyggj, og vinnulívsfólk ferðast nógv, so hann hevur góðar vónir um at sleppa upp í part har.

– Føroyingar eru sum heild eitt lokalt fólkaslag, so eg vænti, at eysturoyingar far at stuðla okkum, sigur hann og leggur afturat, at longu nú hava tey merkt ein ávísan áhuga.

Novena Tours heldur til í handilsbygninginum yvir av Statoil støðini í Saltangará.

# P/f Atlantis letur aftur

**Leiðslan á kryvjivirkinum Atlantis í Vestmanna noyðist nú at taka avleiðingarnar av rákinum í alivinnuni, og í næstu letur virkið aftur. Orsakað av ILA-smittuni og lágu marknaðarprísunum er eingin laksur eftir at kryvja í Vestmanna, og sostatt gerast tey 20 arbeiðsfólkini á virkinum arbeiðsleys**

ALIVINNA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Tað er spell fyri Vestmanna bygd, at 20 fólk gerast arbeiðsleys, nú kryvjivirkið Atlantis letur aftur, sigur stjórin Jákup Oluf Hansen, sum riggar av, áðrenn lykilin í næstu viku verður snaraður fyri seinastu ferð í bygninginum í havnini í Vestmanna*

Eftir at hava kruvt laks síðani 1996 fer kryvjivirkið Atlantis í Vestmanna nú í søguna. Tað er stutt sagt ikki nakar laksur eftir at kryvja, og stjórin á virkinum frá apríl 1999, Jákup Oluf Hansen, sigur, at staðfestingin av herviligu ILA-smittuni í fjør og lækkandi prísirnir hava givið kryvjivirkinum Atlantis mønustingin.

– Í næstu viku er so eingin laksur eftir í Vestmanna at gera til, og so er ikki nógv annað at gera enn at lata aftur, staðfestir Jákup Oluf Hansen. Tey 20 arbeiðsfólkini á virkinum fingu øll uppsøgn 1. desember í fjør, og tískil er endin ikki nakað, sum nú kemur óvart á.

## Byrjaðu í 1996

P/f Nævir, Sandá Samtakið og Vestmanna Fiskavirki stovnaðu Atlantis fyri átta árum síðani, men í tíðarskeiðnum frá 2001-2003 tók Sandá Samtakið einsamalt yvir virkið. Síðani vórðu partabrøvini yvirtikin av Vestlax seint í 2003, har ein nevnd varð sett at stýra virkinum.

Nú verður arbeiðið so lagt niður í bygninginum í Vestmanna, sum Atlantis hesi árini hevur leigað frá Vestmanna Fiskavirki, og so er virkisbygningurin tøkur og til reiðar at nýta hjá øðrum møguligum aktivitieti.

– Partafelagið Atlantis fer so ikki aftur at vera virkið, men vit vóna, at bygningurin ikki fer at standa tómur í framtíðini, tí tað er jú altíð spell fyri vinnulívið í bygdini. Nógv ung fólk hava verið tengd at arbeiðinum á virkinum, og tey missa nú møguleikan at arbeiða í bygdini, sigur stjórin á Atlantis, sum í løtuni riggar av, áðrenn seinastu laksarnir verða kruvdir í næstu viku.

## Eingin endurreisn

Jákup Oluf Hansen trýr ikki á nakra endurreisn fyri vinnuna í Vestmanna, um rákið skuldi vent í alivinnuni í Føroyum.

– Um fiskur verður settur út aftur og vend kemur í gongdina, verður hann í fyrsta lagi kruvdur um tvey ár, og eg havi torført við at ímynda mær, at nakað verður gjørt í Vestmanna tá, staðfestir stjórin.

Hóast P/f Atlantis sambært honum hvørki er í skuld ella í svárum fíggjarligum trupulleikum, nú virkið letur aftur, mugu teir kortini ásannað, at ikki ber til at halda fram uttan nakran laks at kryvja, og sostatt hevur enn eitt virkið kent sviðan av kreppuni í alivinnuni, har 20 fólk mugu leita eftir nýggjum arbeiði.



# Vána »hang-out stað«

**Statoilstøðin á Tvøroyri er staðið, har ung hittast. Tey eru ikki serliga fegin um staðið, og eigarnir eru onki fegnir um at hava tey ungu »hangandi«. Men onki annað stað er - uttan bilarnir! Og kommunan ásannar, at tað er sera fátæksligt við hølum til ungdómin**

*Anna P. Mortensen*



*Mynd: Pakhús 4 (næstuttast til høgru), sum er í heili fimm hæddum, skal vera ungdóms- og mentanarhús*



*Mynd: Britt og Esther vóna, at ungdómshúsið skjótt verður veruleiki, tí stórur tørvur er á tí*

Flestu av okkum kenna eitt ella fleiri hang-out støð, har vit klumpaðust saman, prátaðu, flentu, gjørdu gjøldur, fjeppaðust o.s.fr. - eitt stað, har tey vaksnu sjálvdan komu. Sjálv var eg tannáringur her á Tvøroyri í 80unum, Frændur vóru í hæddini, kioskirnar hjá Bjarna sála og Hans vóru støðini, Logjan og Skóthúsið. Í Logjuni var plátuspælari, vit høvdu plátur við heimanífrá ella vit fóru niður í kjallaran at lýða á, tá okkurt orkestur vandi.

Í dag er tað so Statoil. Bara Statoil. Sjálvandi eru tað nógv ung, ið íðka ítrótt nakrir ella fleiri tímar um vikuna, og tað trýtur heldur ikki við góðum ítróttartilboðum í góðum umhvørvi. Men tað vil altíð vera ein partur ið ikki íðkar ítrótt - sum ikki kennir seg væl í eini ítróttarhøll. So er bara Statoil!

Britt og Esther ganga í 9. flokki í Tvøroyrar skúla. Tær venja báðar fótbólt, og Esther spælir eisini flogbólt. Men hóast tað, inniheldur skúlavikan nógvar tímar, sum verða nýttir niðri í Statoil:

– Vit kunnu ikki lata vera við at koma har, tí onga aðrastaðni er at fara. Vit kunnu onki gera, og tosa vit ov hart ella flenna ov hart, verða vit átalað fyri at styggja aðrir kundar burtur. Tað kann gott vera, at tað er so, og vit vildu fegnar hildið okkum burtur. Tað gera vit so eisini onkuntíð, fara heim til onkran ella sita í onkrum bili, men tá koyra vit aftur og fram við Statoil, fyri at hyggja, hvør nú man vera komin. OK, vit eru so ikki tær, ið koma har mest. Summi brúka meginpartin av frítíðini í Statoil, tað er ræðuligt!

Í síðstu viku var grein her í blaðnum um ætlanirnar hjá T F. Thomsen A/S at gera ungdóms- og mentanarstað í einum av pakkhúsunum.

Spurdar, hvat tær halda um, at ein ungdómsklubbur verður stovnaður, siga báðar hetta vera SUPER. Og tær eru samdar um, at fara nakrir bleytir stólar at finnast har ella ein sofa, ja, so hevði tað bara verið fantastiskt. Og tað má sigast, at krøvini ikki eru so øgiliga høg...

## Stuðul til ungdómshøli

Pauli Einarsson er formaður í mentanarnevndini í Tvøroyrar kommunu. Hann ásannar, at tað er sera fátaksligt við hølum til tey ungu og mentan yvirhøvur:

– Stuðulin hjá kommununi á ungdómsøkinum fer til ítróttina. Og ein heilt stórur partur av stuðuli fer til barnaansing. Vit hava plássgaranti í kommununi, og hóast øll børn hava ansingarpláss, er útibarnagarður júst stovnaður. Men ungdómurin... har væntar! Teimum væntar eitt hugnaligt stað at hittast, har møguleiki eisini er fyri at spæla tónleik o.a.

Pauli hevur sjálvur brúkt nógva tíð til tónleikin, hevur javnan vant við orkestrum her á staðnum:

– Vit vandu í Logjuni. Har savnaðust nógv ung, og øll vóru væl nøgd. Vit stóðu og vandu, meðan hini søgdu seg fáa eina gratis konsert.

Í dag er onki slíkt stað, og tað er stórt spell. Bygningurin hjá kommununi, sum Poul Hansen húsaðist í á Hvítanesi, stendur tómur. Uppskot varð lagt fyri kommununa at fáa hesi hølið gjørd í stand til mentanarhús, men undirtøka var ikki fyri tí.

Tosað hevur verið um, at kommunan hevur ætlanir um at saltsiloin á Drelnesi skal gerast mentanarstað, men Pauli sigur, at tað er ikki vorðið til nakað ítøkiligt. Saltsiloin skal renoverast frá botni av, og verður ein sera kostnaðarmikil verkætlan.

Spurdur, hvat hann heldur um ætlanina hjá T.F. Thomsen A/S at gera eitt av pakhúsunum til ungdóms- og mentanarstað - og hvussu kommunan hevði kunnað stuðlað - sigur hann:

– Gomlu pakhúsini, sum liggja mitt í bygdini eru sera attraktivt økið. Tað eru júst støð sum hesi, man leitar eftir í grannalondnum og brúkar til mentanarlig endamál, Norðurbryggjan í Keypmannahavn er eitt dømi. Vit hava sama umhvørvi her í minni formati! Tað, ið krevst av einum persóni, ið fer undir eina slíka verkætlan er, at viðkomandi dugur at byggja eitt umhvørvið upp um staðið, og tað vænti eg eisini, at stigtakarnir gera. Anna Kirstin er dugnaligur íverksetari - tað hava vit sæð - so alt talar fyri, at ætlanin kann gerast veruleiki.

Pauli Einarsson sigur, at kommunan er áhugað at stuðla tiltøkum, ið eru til frama fyri ungdóm og mentan í bygdini - tað verið seg, um tað eru persónar ella feløg, ið standa aftanfyri. Kommunan kann veita beinleiðis peningastuðul ella óbeinleiðis stuðul, við at tryggja karmar til ymisk tiltøk, eitt nú við at lata ítróttarhøllina til t.d. eina konsert. Men fyrst av øllum mugu vit síggja eina ítøkiliga verkætlan. Harnæst verður fundur, og triðja stigið kundi verið ein roynd at fingið verkætlanina - sum hugsandi bæði kundi komið undir ungdómsarbeiði og restaurering og viðlíkahald av gomlum bygningum - á fíggjarlógina næstu ferð. Verkætlanin er til frama fyri trivnaðin í bygdini - serliga hjá teimum ungu - so her skuldu allir møguleikar staðið opnir.

# Eingin avtala um norðhavssildina

**Eingin avtala spurdist burtur úr samráðingunum í Keypmannahavn um norðhavssildina. Føroysku umboðini fóru eftir somu avtalu sum í 1997, ið hevur verið galdandi til 2002, men av tí at Noreg kravdi 66% av heildarkvotuni fekst eingin semja**

SILDASAMRÁÐINGAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ísland hevði, eftir áheitan úr ES og Noreg, boðað til samráðingarfundar viðvíkjandi fyrisitingartiltøkum og fiskiskapi eftir norðurhavssild í 2004. Strandarlondini, sum luttaka í hesum samráðingunum, eru umframt Ísland, ES, Føroyar, Noreg og Russland. Fundurin var í Keypmannahavn 16-17. februar 2004.

Tey fimm strandarlondini samdust um fiskiskapin fyri 1997 og hava síðani fram til 2002 gjørt avtalu fyrst um heildarveiðu og síðani býtt kvotuna við sama býtislykli øll árini - bæði millum londini og við at geva lutfalsliga somu atgongd til skip úr øðrum pørtum at fiska í heimasjógvi.

Semjan helt ikki, tá samráðingarnar fyri fiskiskapin í 2003 vórðu tiknar upp í St. Pætursborg í oktober 2002. Noreg noktaði at halda fram við fimmpartaavtaluni, sum hevur verið grundarlagið undir býtinum av norðurhavssild síðani 1997. Noreg kravdi sín part hækkaðan úr 57% upp í 70% grundað á, at norðurhavssildin mest er í, og verður fiskað í norskum sjógvi - íroknað Jan Mayen og Svalbard. Eingin av hinum pørtunum kundu góðtaka norska kravið og hildu fast við fimmparta-avtaluna. Hetta stríðið endaði so við, at partarnir hvør sær á vári 2003 gjørdu avtalu við Noreg um, at hvør parturin hevði fiskimøguleikar samsvarandi upprunaliga býtinum, men at man samstundis lat Noreg ein part av hesum afturímóti, at Noreg gav fulla atgongd fyri restina av kvotuni at kunna verða fiskað í norskum sjógvi.

Føroyar og ES høvdu avtalað, at útgangsstøðið fyri samráðingunum var lutfalsligur niðurskurður í kvotu hjá báðum pørtum fyri økta atgongd. ICES hevur mælt til, at fiskiskapurin verður samsvarandi hesum veiðusetningi, og at veiðan í 2004 ikki fer upp um 825.000 tons.

Føroyska samráðingarnevndin fór eftir at fáa somu avtalu aftur, sum var galdandi í 1997, og um hetta ikki var møguligt so at finna eina eina loysn fyri 2004, har virðið av sínámillum avtalu fór at verða samanborið soleiðis, at Føroyar fáa eins stóran ágóða av avtaluni, sum Noreg fær. Í 3. lagi um eingin strandarlandaavtala fekst, so mugu Føroyar seta sær eina egnu kvotu grundað á semjuna í 1996.

Úrslitið gjørdist, at strandarlondini ikki kundu semjast um eina nýggja strandarlandaavtalu, tí Noreg kravdi 65% av heildarveiðuni í mun til 57% eftir avtalunum frá 1997 - 2002. Sostatt er eingin sildaavtala enn gjørd fyri 2004.